## Sparingar fara at svíða



Tað er ikki bara samgongan í Føroyum, sum arbeiðir við sparingum á fíggjarlógini. Tað er samgongan í Grønlandi eisini, og tann grønlendski landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Palle Christiansen, ásannar, at summi fara at kenna sviðan av, at politikararnir tátta fíggjarpolitikkin. Men samgongan í Grønlandi ætlar ikki bara at spara. Talan verður eisini um nýggjar inntøkur, og teirra millum er eitt avgjald fyri fiskirættindi uttanskers. Eitt annað tiltak er, at samgongan ætlar at steðga tollfríari rúsdrekka- og tubbakssølu eit tíðarskeið fyri at fáa meiri pengar í landskassan. Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2010 kemur tann 30. september.

## Eingin bankapakki afturat

Teir seinastu dagarnar hava fleiri danskar fyritøkur mælt stjórnini til at koma við einum bankapakka afturat í heyst, men sambært Børsen sleppa fyritøkurnar at bíða til fánýtis. Lene Espersen, búskapar- og vinnumálaráðharri, sigur við blaðið, at tær fimm milliardir krónurnar, sum eru í tí nýggja kreditpakkanum hjá stjórnini, loysa teir trupulleikarnar, sum bankapakki II ikki loysti. Tí er ikki tørvur á enn einum bankapakka, sigur hon. Lene Espersen vil tó ikki útiloka, at tað kann gerast neyðugt við enn einum bankapakka, tí taka onnur lond slík stig, má Danmark fylgja við fyri at varðveita kappingarførið.

# Fólk verða svøk av tvístertum

**Í løtuni uppliva vit eina sanna innrás av tvístertum. Frægastu ráðini eru at sproyta við eiturevni og ikki at hava gras heilt inn til grundina, sigur Dorete Bloch, lívfrøðingur**



*Kelda: Bloch, D. 2006. Føroysk skaðadjór. Tvísterta. Frøði s 24-25.*

TVÍSTERTUPLÁGA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eingin veit um so nógvar tvístertur, vespur og onnur ódámligar verur, sum hava gjørt lívið súrt hjá nógvum í summar.

Summarið hevur verið so lýtt, og tað er óivað ein orsøkin til, at tað eru so nógvar tvístertur í ár. Vanliga kemur tann stóra innrásin av tvístertum ikki fyrr enn í august, men í ár var tvístertan fyrr á veg.

Nógv fólk hava gremt seg um nógvu tvísterturnar. Tær eru ikki vandamiklar, og tær býta ikki, men tað er einki serligt at vakna, og tvístertur eru at finna í songini, í klæðum, í skápum, í mati ella í borðlappum.

Sambært Dorete Bloch, er tað ikki lætt at halda tvístertunum úti. Plágan er størst í nýggjum húsum og í húsum við flagtaki.

Tað besta at gera er fyri at forða tvístertunum í at sleppa inn, er at lata vindeyguni aftur. Hetta ber tó illa til um summarið, tá ið tað er lýtt, og sólin skínur.

Eini ráð eru ikki at hava gras heilt inn til grundina, og at grasið longur burturi frá húsunum er væl sligið.

Tað ber til at koyra eitur fram við grundingini, so tvísterturnar doyggja, ætla tær at krúpa inn. Eru fleiri tvístertur komnar inn, kanst tú sproyta tær við eiturevni. Dorete Bloch, leiðari á djóradeildini á Føroya Náttúrugripasavni, mælir til at brúka eiturevni við pyrethrin ell pyrethrum í, tí hesi evni eru tikin úr plantum og eitra bert skordjór.

Tvístertur hava smáar veingir, og tað skuldi verið prógv um, at tær kunnu flúgva, sjálvt um fá hava sæð tvístertu á flogi.

Hevut tú ikki hug at fara í hernað móti tvístertunum, noyðist tú at brynja teg við toli til í heyst, tá ið tær grava seg niður fyri veturin.

Men í mars koma tær aftur.

## Evropisk avbjóðing úr fronskum sjónarhorni

Í annaðkvøld klokkan 19:30 fer franski varasendiharrin í Keypmannahavn, Thomas Wagner, at halda fyrilestur í Miðlahúsinum, hann nevnir **»European challenges, a French perspective«**

Tað er í sambandi við fótbóltslandsdystin millum Føroya og Frakland á Tórsvølli mikudagin 12. august 2009, at Thomas Wagner, First Counsellor á fronsku ambassaduni í Keypmannahavn, vitjar Føroyar.

Í hesum sambandi skipar franski konsulin í Føroyum, Julianna Klett, saman við Vinnuhúsinum fyri áhugaverda fyrilestrinum.

Fyrilesturin, sum er almennur, verður í Miðlahúsinum **týskvøldið 11. august kl. 19:30.**

Um Thomas Wagner er at siga, at hann hevur lisið Political Science og hevur arbeitt innan franska Uttanríkisráðið síðan 1993. Tomas Wagner er serfrøðingur innan trygdarpolitikk og hevur m. a. arbeitt í Chad, við ST í Geneve og í Nato í Brussel. Síðan 2007 hevur hann verið næsti maður hjá franska ambassadørinum í Keypmannahavn.

Grannskoðan • Ársfrásøgn • Bókhald
MVG • Skatt • Ráðgeving




Vegna summarfrí er skrivstovan afturlatin frá 10. aug. til 28. aug. 2009

**Roknskaparfelagið**
J.C. Svabosgøta 48
Postboks 2210
110 Tórshavn
Telefon: 309400
Fax: 309409
roknskap@roknskap.fo

# Avbjóðingar í mun til javnstøðu

FYRILESTUR

*Tíðindaskriv*

Hvør skal strúka skjúrturnar, tá maðurin ikki dugir, og konan ikki vil? Hetta er heiti á fyrilestri, sum Kristine Strecker Hestbech heldur fyri Demokratia mánakvøldið 10. august.

Fyrilesturin snýr seg um avbjóðingar í mun til javnstøðu, bæði í samfelagnum og heima við hús.

Kristine Strecker Hestbech er útbúgvin gudfrøðingur. Hon er 41 ára gomul og hevur verið prestur í 12 ár, bæði í Danmark og í Føroyum.

Kristine Strecker Hestbech var limur í familju- og arbeiðskommisjónini, sum danska stjórnin setti til at gera frágreiðing um javnvág millum arbeiði og familjulív. Hendan javnvág kann vera torfør at raka hjá nógvum, og er ofta orsøkin til, at serliga kvinnur, ið hava familju, ikki átaka sær alt ov stóra ábyrgd í arbeiðslívinum, eitt nú sum politikarar.

Kristine Strecker Hestbech skipar eisini fyri pílagrímsferðum, bæði í Danmark og í Føroyum.

Hon er væl umtókt í Føroyum. Hennara tiltøk eru væl vitjað, og hon hevur evnini at bera ein boðskap fram á ein greiðan hátt, so at hann røkkur út til nógv fólk. Hetta kvøldið tosar hon so um avbjóðingar í mun til javnstøðu í samfelagnum og í familjuni.

Hesin fyrilestur er ein av mongum, sum Demokratia skipar fyri fyri at økja um javnstøðu í politikki.

Fyrilesturin verður í Løkshøll, Rókavegi 1, í Runavík. Tiltakið er alment og ókeypis. Øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Demokratia, sum skipar fyri.



*Kristine Strecker Hestbech*